

Johan Sverdrup sum økið sær út á tekniborðinum. Mynd: Statoil

# Statoil hevur gjørt avtalur fyri milliardir í dag

**Jógvan Hugo Gardar**

09.12.2015 - 16:13

Oljan.fo

Risaútbyggingin Johan Sverdrup, sum Statoil er fyristøðufelag fyri, hevur í dag gjørt undiravtalur fyri partar av byggingini. Tríggjar avtalur um útbygging av pørtum av Johan Sverdrup eru undirskrivaðar í dag. Virði er umleið 2,5 milliardir norskar krónur.

Mitsu & Co. Norway skal gera rørini til flutningspartin.

Wasco Coatings Malaysia gera serviðgerð sum skal til av bæði olju- og gassrørunum.

Saipem hevur fingið avtalu um at sleppa at leggja rørini.

Ætlanarstjóri, Kjetel Digre, sigur í eini viðmerking, at við hesum avtalunum um rør og leggjan av flutningsrørunum, so hevur Johan Sverdrup-øki lagt grundarlag fyri at halda málið um at framleiða fyrstu oljuna her í 2019.